# Illur um súkklu-stuldur

37 ára gamli Lance Armstrond varð í øðini, tá hann fann útav, at onkur hevði stolið serbygdu súkkluna, sum hann nýtir til einkultstartin. Hetta hendi dagin fyri prologin í Tour of California, sum er fyrsta kappingin, sum Armstrong súkklar í Amerika, síðani hann byrjaði sítt come-back. Sjálvur prologurin gjørdist annars heldur óvanligur, tí túsundtals fjepparar fagnaðu Armstrong fram við øllum teininum.



# Hjálpandi hond frá Adriano

Brasilski Adriano kom av álvara í fokus, tá hann við fyrsta málinum í dystinum gav sítt íkast til 2-1 sigurin hjá Inter í grannauppgerðini móti AC Milan. Adriano stútaði nevnliga bóltin á sín egna arm, og haðani støkk bólturin í meskarnar, uttan at dómarin sá nakað løgið í tí. Seinni økti Dejan Stankovic til 2-0, áðrenn Pato minkaði munin fyri Milan. Inter er klárt á odda í seriu A við 56 stigum. Tað eru níggju fleiri enn Juventus, sum er á øðrum plássi.

H71-StÍF 23-20 (11-11):

# StÍF sett av

**Hóast StÍF var á odda í stórum løtum av dystinum, má liðið nú veittra farvæl til FM-stríðið. Hoyvíkingar renna framvegis aftaná oddanum**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Frøin var stór, tá Regin Poulsen staðfesti sigurin hjá H71 við 44 sekundum eftir at spæla. Hann lyfti heimaliðið upp á 22-20, og staðfesti harvið, at StÍF ikki verður í FM-finaluni í 2009. Hinvegin er hoyvíkingar framvegis við, har tvey stig framvegis skilja teimum frá Neistanum.

Tað var eingin stór hondbóltsuppliving, tá StÍF vitjaði í høllini í Hoyvík í gjár. Spælið var lítið sannførandi, og rómurin millum áskoðarnar segði nær um alt. Einasti larmurin var, tá spælararnir royndu at koyra undir hvønn annan.

## Lág leikferð

»Offence sells tickets. Defence wins championships.«

Soleiðis ljóðar enska hugtakið, og eftir dystinum í gjár at døma, høvdu hoyvíkingar av álvara lagt sær hetta í geyma. Bæði stigini vóru alneyðug, um liðið skuldi varðveita sín møguliga í stríðnum um FM-heitið. Har afturat hevði ein sigur við sær, at StÍF mátti veittra farvæl til føroyameistaraheitið.



*Hoyvíkingar hildu høvdið kalt seinastu løtuna, og so megnaðu teir at toga tey bæði stigini til høldar móti StÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Dysturin var sera lítið undirhaldandi at byrja við. Leikferðin var lág, og áskoðararnir vóru als ikki við. Hoyvíkingar høvdu lítið hugflog í sínum álopsspæli, men hóast verjan stóð væl, vunnu gestirnir sær skjótt eina trygga leiðslu. Eitt skifti vóru frá mál á muni millum liðini.

Í dystarfrásagnini varð dúgligt skriva um fyrilesturin, sum Rasmus Ankersen hevði fyri H71-leikarunum herfyri um at vera ein vinnari. Um tað varð avgerandi, skal ikki verða sagt, men í øllum førum stríddi heimaliðið seg aftur í dystin. Og seinasta korterið steðgaði fullkomiliga upp hjá StÍF, og hoyvíkingar fóru framum. Har vóru teir til John Petersen staðfestir sigurin í seinastu sekundunum.

## Hvat ger hann her?

- Tú, svara mær? Er tað John Petersen sum rennur har?!

Ja, rætt hevði konan, sum spyrjandi hugdi at á síðulinjuni. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki kom fyrrverandi stórspælarin John Petersen á vøllin fyri H71. Hann hevur ikki spælt hondbólt á hægsta støði seinnu árini, men í vetur hevur hann verið partur av eykaliðnum hjá hoyvíkingum. Tað hevur hann eftir øllum at døma gjørt somikið væl, at Kári Nielsen sendi boð eftir honum til besta liðið

Í verjupartinum stóð John Petersen seg væl, men í álopspartinum eydnaðist honum bara at fáa tvey mál, hóast hann ofta slapp leysur av vinstra vongi.

## H71 hongur í

H71 vann sær tvey sera týðandi stig í gjár. Hoyvíkingar hava illa ráð at tapa komandi vikurnar, tí Neistin tykist stórspælandi í løtuni. Komandi vikuskiftið vitjar VÍF í høllini í Hoyvík, og tá skal H71 veruliga royna seg.

StÍF er nú sett av í oddastríðnum. Strandingar hava seinastu vikurnar livað í vónini um finalupláss, men nú eru heili seks stig upp til annað plássið. Harvið hava teir nú veittrað farvæl til gullheiðursmerkini.

## FAKTA um dystin

**H71-StÍF 23-20 (11-11)**
10 min: 3-3
20 min: 5-9
40 min: 13-15
50 min: 18-17
**Málskjúttar**
**H71**: Dánjal Tórgarð 5(1), Bárður Brimvík 3, Janus Sørensen 3, Danni Syhler 3, John Petersen 2, Regin Joensen 2, Esbern Paturson 2, Halgir Dahl Olesen 1, Poul Kjartan Dam 1
**StÍF**: Cristian Preda 4(2), Mortan Hansen 4(1), Alexandur Johansen 3, Bárður Danielsen 2, Bent Djurhuus 2, Jóanes Prestá 2, Borgar Danielsen 1, Rúni Niclasen 1, Pauli G. Hansen 1
**Brotskøst**: H71 3, StÍF 4
**Útvísingar**: H71 4, StÍF 1
**Dómarar**: Hannis Wardum & Andreas F. Hansen

# Sigurin var uppiborin

- Samanborið við fleiri aðrar dystir, megna vit í dag at halda høvdið kalt seinastu løtuna. Tað er høvuðsorsøkin til, at vit enda omaná.

Tað sigur Jóhan Hofgaard, málverji hjá H71. Hann metir, at sigurin var fult uppiborin.

- Vit hava fleiri upplagdar møguleikar, sum vit misnýta. StÍF høvdu ikki serliga nógvar av teimum sokallaðu 100 prosent møguleikunum.

Tit hava havt stór sveiggj í úrslitunum í hesum kappingarárinum. Er tað realistiskt hjá tykkum at fáa Neistan, sum er stórspælandi í løtuni, aftur á stigatalvuni?

- Vit hava ikki størri sveiggj í úrslitunum enn Neistin. Vit eru ájavnir í stigum, um dysturin millum Neistan og VÍF skal spælast av nýggjum. Vit kunnu framvegis sjálvir avgerða okkara lut í oddastríðnum, og vit ætla okkum sjálvsagt at vinna restina, sigur Jóhan Hofgaard avgjørdur á málinum.

**-uni**

